# NÁMSÆTLAN

Fagott

Tórshavnar musikkskúli

## ALMENN LÝSING AV LJÓÐFØRINUM

Fagottin er tað ljóðføri í træblásarafamiljuni, sum hevur djúpasta ljóðið. Mann hoyrir ofta fagottina spæla eina bassstemmu, men eisini ber til at spæla vakrar melodiar og solostykki á høgum tónum. Ljóðið líkist tí menniskjaligu røddini og er framleitt við einum dupultrøri. Fagottin er mest kend í klassiska tónleikaheiminum, men kan brúkast í øllum tónleikasløgum.

Fagottin hevur eina stórasystur, sum eitur kontrafagott. Hon ljóðar enn djúpari. Fagottin kann brúkast í alskyns samanspælshøpi, bæði í minni bólkum og stórum orkestrum.

Til ber at spæla fagott tá mann er 10-12 ár, ella um hendurnar eru nóg stórar.

# INNSKÚLING – MENNINGARSTIG 1

## FRÁLÆRUMÁL

### ALMENN FRÁLÆRUMÁL

- næmingurin hevur grundleggjandi framførsluførleika.
- luttekur í samanspæli/sangi, og er felagsliga fúsur og virkin.
- lærir við at spæla, kanna, troyta nýggjar leiðir, og hugleiða um tað, ið farið er fram.
- kennir grundhugtøk innan tónleik.
- venur seg við at framføra á hóskandi palli.
- er partur av tí livandi mentanarlívinum í nærumhvørvinum, og er harvið við til at skapa lívsgleði og felgssamleika.

### FRÁLÆRUMÁL TIL LJÓÐFØRIÐ

- At læra næmingin mest grundleggjandi vitanina um fagottina.
- At samla og halda fagottina rætt og at skapa eina góða munnstøðu.
- Harumframt skal næmingurin læra eitt sindur um andadrátt.

### UPPGÁVAN HJÁ LÆRARANUM ER

- menna eitt frálæruumhvørvi, har samstarv, uppliving og virksemi verða sett í hásæti.
- leggja dent á arbeiðshátt og dugnaskap.
- leggja lunnar undir grundførleika og tónlistaligar grundtættir.
- vekjur ans og mennir hjáveru.
- er opin fyri breiðum og fjøltáttaðum samstarvi
- er partur av tí livandi mentanarlívinum í nærumhvørvinum, og er harvið við til at skapa lívsgleði og felgssamleika.

# INNSKÚLING - MENNINGARSTIG 1

## VERKLISTI

*First book of bassoon studies (Faber)*
*Böhm, 16 progressive pieces for bassoon (Emerson)*
*Easy winners for bassoon (Brass, wind +)*
*25 fun moments for bassoon (Studio Music)*

## VENJINGAR

*Learn as you play bassoon (Boosy&Hawkes)*
*90 easy bassoon studies (Emerson)*
*Weissenborn bassoon studies (Vol.1)*
*16 characteristics for bassoon*

## TÓNASTIGAR, TRÝ- OG FÝRALJÓMAR, MINKAÐAR OG VÍÐKAÐAR LJÓMAR, IMPROVISATIÓN O.A.

F-dur (1 oktavur) + trýljómur,
G-dur (1 oktavur) + trýljómur
e-moll (1 oktavur) + trýljómur
C-dur (1 oktavur, ikki lægst) + trýljómur
a-moll (1 oktavur) + trýljómur

# BYRJANARDEILD - MENNINGARSTIG 2

## FRÁLÆRUMÁL

### ALMENN FRÁLÆRUMÁL

- næmingurin dugr at handfara ljóðføri og brúka partar av tí.
- næmingurin hermir, spælir/syngur løg og rytmur eftir oyranum.
- lurtar eftir, og metur um egnu framførslu.
- merkir taktina/pulsin í verkinum.
- lesur nótar við at syngja á nótanøvnum.
- lesur nótar við at samanbera og finna nótar, ið líkjast.
- spælir einføld løg av nótablaði.
- ger, fyriskipar og skrivar niður síni egnu løg.
- finnur upp á løg út frá tónum, søgum, og huglagi.
- greiðir frá tí, ið eyðkennir góðan spælihátt og góða grundleggjandi tøkni.
- venur regluliga og samstarvar við læraran og foreldur/avvarðandi í hesum høpi.
- spælir/syngur tónleik í ymiskum høpi.

### FRÁLÆRUMÁL TIL LJÓÐFØRIÐ

Vanliga verður miðað eftir, at næmingar, ið spæla fagott frá tíggju-tólv ára aldri, taka byrjanardeild eftir 1 – 2 árum. Hetta er tó ymiskt, alt eftir aldri og førleika.

Tá ið næmingurin er liðugur í byrjanardeildini, skal næmingurin vera førur fyri:

- at halda fagottina rætt
- at hava góðan kropsburð
- at hava hóskandi munnrørslur og munnspenni
- at hava lættar og leysar fingrar og brúka hálvt og kvart hol í vinstra fremstfingrinum
- at hava reinan og opnan tóna
- at anda djúpt inn og stuðla innandingini
- at nýta ymiska styrki
- at spæla bæði bundið og óbundið
- at hava gott tamarhald á einfaldari tungu
- at kunna lesa og spæla einfald verk uttan fyrireiking
- at kunna spæla uttan nótar eftir oyranum
- at spæla saman við øðrum
- at spæla sikkurt og sannførandi
- at hava hampuligt taktskil
- at hava ans fyri tulking og innihaldi
- at hava tikist við fjølbroyttar uppgávur

- at byrja við at lesa tenorlykil
- at byrja við at brúka tummilsklaffar í vinstru hond (‘sleiparaklaffar’)

### Uppgávan hjá læraranum er

- fær næmingin at venja seg við ljóðførið og tað, ið ljóðførið megnar.
- leggja dent á arbeiðshátt og dugnaskap.
- leggja lunnar undir grundførleika og tónlistaligar grundtættir.
- vekjur ans og mennir hjáveru.
- er opin fyri breiðum og fjøltáttaðum samstarvi
- er partur av tí livandi mentanarlívinum í nærumhvørvinum, og er harvið við til at skapa lívsgleði og felgssamleika.

# BYRJANARDEILD - MENNINGARSTIG 2

## VERKLISTI

*First book plus second book af bassoon studies (Faber)*
*Böhm, 16 progressive pieces for bassoon (Emerson)*
*Easy winners for bassoon (Brass, wind +)*
*25 fun moments for bassoon (Studio Music)*

## VENJINGAR

*Learn as you play bassoon (Boosy&Hawkes)*
*90 easy bassoon studies (Emerson)*
*Weissenborn bassoon studies (Vol.1)*
*16 characteristics for bassoon*
*G Sheen, 26 melodic studies for bassoon (Emerson)*

## TÓNASTIGAR, TRÝ- OG FÝRALJÓMAR, MINKAÐAR OG VÍÐKAÐAR LJÓMAR, IMPROVISATIÓN O.A.

C-dur (1 ella 2 oktavar), D-dur (2 oktavar), G-dur (a 12th), A-dur (a 12th),
Bb-dur (a 12th), e-moll (a 12th) harmoniskt og meoldiskt, a-moll (a 12th) harmoniskt og meoldiskt,
d-moll (2 oktavar)

Kromatiskt á F og G

Trýljómar:
G-dur (a 12$^{th}$), A-dur (a 12$^{th}$), Bb-dur (a 12$^{th}$), a-moll (a 12$^{th}$), e-moll (a 12$^{th}$), d-moll (2 oktavar)

# MIÐDEILD - MENNINGARSTIG 3

## FRÁLÆRUMÁL

### ALMENN FRÁLÆRUMÁL

- næmingurin hevur grundleggjandi førleikar á ljóðføri sínum.
- næmingurin endurgevur ymisk sløg av tónleiki.
- skapar sjálvur út frá ymiskum tónastigum og tónasamljóðum
- lurtar eftir egnum spæli og spælinum hjá øðrum.
- skilir og dugur at brúka tríklangir og tónastigar.
- spælir einføld stykki eftir oyranum.
- lesur, tulkar og nýtur tónleikaástøði og tónleikasøgu í venjing av verkum.
- skrivar og/ella spælir/syngur egin løg.
- spælir eftir oyranum út frá einum tónastiga.

### FRÁLÆRUMÁL TIL LJÓÐFØRIÐ

Nú verður frálæran meira víðfevnd enn áður. Næmingar í miðdeild eru í flestu førum næmingar ið hava spælt 3-4 ár, alt eftir ídni, aldri og búningargongdina hjá tí einstaka næminginum.

Tá ið miðdeild, menningarstig 3, er fingið til høldar, skal næmingurin vera førur fyri:

- at hava natúrliga og væl vanda munnstøðu
- at hava lættar og kimiligar fingrarørslur og brúka 'sleiparaklaffar' við vinstra tumlinum
- at hava djúpa og lætta innanding og góðan stuðul
- at hava vakran og opnan tóna
- at kunna stemma ljóðførið saman við øðrum ljóðførum
- at kunna gera týðiligan mun á legato og staccato
- at hava góða tungutøkni
- at lesa og spæla verk uttan fyrireiking
- hava neyvt taktskil
- hava spælt fjølboytt úrval av verkum
- vera vanur við samspæl og improvisatión
- at lesa tenor lykil uttan trupulleikar

### UPPGÁVAN HJÁ LÆRARANUM ER

- byggir víðari á teir førleikar, sum næmingurin longu hevur ognað sær.
- leggur stóran dent á spæligleði og førleika.
- leggur til rættis soleiðis at næmingurin fær roynt seg í ymiskum samanspæli.
- leggur lunnar undir góðan tekniskan førleika og kropsliga tilvitan.

- mennir tónhoyrn og tónalæru í venjing og framførslu.
- leggur dent á tað, ið næmingurin skapar og spælir eftir oyranum.
- mennir grundleggjandi vitan um tónleik.

# MIÐDEILD - MENNINGARSTIG 3

## Verklisti

*Time pieces for bassoon, Vol2 (ABRSM)*
*Galliard, Sonata a-moll*
*Jacob, four sketches (Emerson)*
*J.S. Bach, three movements from the solo cello suites for bassoon (ABRSM)*
*Telemann, sonata f-moll*
*Classical and romantic pieces for bassoon, book 1*

## Venjingar

*Weissenborn bassoon studies (Vol.1 + 2)*
*16 characteristics for bassoon*
*G Sheen, 26 melodic studies for bassoon (Emerson)*

## Tónastigar, trý- og fýraljómar, minkaðar og víðkaðar ljómar, improvisatión o.a.

2 oktavar pluss trýljómar

Bb-dur, D-dur, E-dur, F-dur

2 oktavar, harmoniskt og meoldiskt pluss trýljómar

b-moll, c-moll, e-moll, g-moll

Kromatiskt á F

Fýraljómar:

Dominant7 C-dur

# HÁDEILD - MENNINGARSTIG 4

## FRÁLÆRUMÁL

### ALMENN FRÁLÆRUMÁL

- næmingurin hevur framkomnar førleikar á egnum ljóðføri.
- er førur fyri at kaga djúpt, og spæla tónleik á sjálvstøðugan og persónligan hátt.
- spælir nógv ymisk verk.
- hevur góða tónahoyrn.
- nýtir ástøði í tónleikaframførsluni.
- dugir væl at nýta tónlistalig frøðiheiti.
- hevur nógvar royndir á palli.
- hevur spælt í bólkum av ymiskum slag.
- megnar at framføra krevjandi venjingar og tónaverk.
- ger sær dælt av ymiskum upphitingar- og hugsavningararháttum.
- er góð fyrimynd fyri aðrar næmingar.
- fyrireikar seg við lít bæði til upptøkuroyndir og víðari útbúgving.
- hevur tamarhald á og kunnleika til grundleggjandi tøkni á sínum egna ljóðføri.
- venur á ymiskan hátt og hevur stirðil, í dagliga arbeiðinum.
- framførir javnan.
- leggur framførslu til rættis, og velur verkini í samstarvi við læraran.

### FRÁLÆRUMÁL TIL LJÓÐFØRIÐ

Hádeildin, menningarstig 4, tekur við, tá ið mideildin, menningarstig 3, er fingið til høldar. Vanliga hava næmingar fingið frálæru í 5-6 ár.

Tá ið hádeildin, menningarstig 4, er fingið til høldar eigur ein fagottnæmingur at vera førur fyri:

- at hava natúrliga og væl vanda munnstøðu
- at hava léttar og kimiligar fingrarørslur
- at hava djúpa innanding og góðan stuðul
- at hava gott tamarhald á vibrato og kunna nýta vibrato á ymiskan hátt
- at kunna stemma ljóðførið saman við øðrum ljóðførum
- at spæla reint, at hava førleika at inntonera og at kunna tillaga inntoneringina í samspælsverkum
- at hava góða styrki á tónunum
- at kunna gera týðiligan mun á legato og staccato
- at hava góða tungutøkni
- at spæla bæði solo og fylgispæl og skilja hvønn leiklut hann hevur í samanhangi
- at veksla millum tenorlykil og basslykil

### Uppgávan hjá lærarunum er

- leggja eina menningarætlan, ið er á høgum fakligum og tónlistaligum støði.
- eggja til sjálvstøðugan arbeiðshátt.
- vera førur fyri at síggja menningarmøguleikar, kveikja og geva íblástur.
- birta upp undir tónlistaligt tilvit.
- fáa nemingin at vera tilvitaðan um at seta sær stutt- og langtíðar mál.
- leggja til rættis fjølbroytt samspæl, og geva næminginum drúgvar royndir á palli.
- meta um bæði tilgongd og tilfar saman við næminginum.
- leggja dent á gott samstarv millum heim, musikkskúla, lærara og næming.

# HÁDEILD - MENNINGARSTIG 4

## VERKLISTI

*Boismortier, two sonatas, op.50 Nos. 4-5 (Musica Rara)*
*Devienne, sonata g-moll, op.24 No.5 (Musica Rara)*
*L Milde, three study pieces*
*W.A. Mozart, Sonata Bb KV292*
*Otto Oromszegi, 15 characteristic pieces in Hungarian style (Emerson)*
*Vanhall, concerto C-dur (Emerson)*
*Vivaldi, sonata e-moll, RV40 (IMC)*
*Vivaldi, concerto a-moll, RV497 (Ricordi)*
*Vivaldi, concerto C-dur, RV472 (Schott)*
*Baroque sonatas for bassoon, vol.1 (Editio Musica Budapest)*
*Hindemith, sonata for bassoon (Schott)*

## VENJINGAR

*Pivonka, rhythmical etudes (Bärenreiter)*
*L. Milde, concert studies, op.26, vol.1*
*L. Milde, 25 studies in scales and chords, op.24*

## TÓNASTIGAR, TRÝ- OG FÝRALJÓMAR, MINKAÐAR OG VÍÐKAÐAR LJÓMAR, IMPROVISATIÓN O.A.

2 oktavar pluss trýljómar (moll tónastigar bæði melodiskt og harmonikst):
C#-dur, E-dur, G-dur, c#-moll, e-moll, g-moll

3 oktavar pluss trýljómar (moll tónastigar bæði melodiskt og harmonikst):
Bb-dur, B-dur, C-dur, Bb-moll, b-moll, c-moll

Kromatiskt á E og G (2 oktavar) og Bb (3 oktavar)

Fýraljómar:

Dominant7 í:
2 oktavar; A-dur, C-dur
3 oktavr: Eb-dur

Dim7 á:
2 oktavar: E,G
3 oktavar: Bb

# FRAMKOMIN DEILD - MENNINGARSTIG 5

## FRÁLÆRUMÁL

### ALMENN FRÁLÆRUMÁL

- næmingurin hevur framkomnar førleikar á egnum ljóðføri.
- er førur fyri at kaga djúpt, og spæla tónleik á sjálvstøðugan og persónligan hátt.
- spælir nógv ymisk verk.
- hevur góða tónahoyrn.
- nýtir ástøði í tónleikaframførsluni.
- dugir væl at nýta tónlistalig frøðiheiti.
- hevur nógvar royndir á palli.
- hevur spælt í bólkum av ymiskum slag.
- megnar at framføra krevjandi venjingar og tónaverk.
- ger sæl dælt av ymiskum upphitingar- og hugsavningararháttum.
- er góð fyrimynd fyri aðrar næmingar.
- fyrireikar seg við lít bæði til upptøkuroyndir og víðari útbúgving.

### FRÁLÆRUMÁL TIL LJÓÐFØRIÐ

Víðarikomin deild, menningarstig 5, tekur við, tá ið hádeildin, menningarstig 4, er fingið til høldar. Vanliga hava næmingar fingið frálæru í meiri enn 6 ár. Næmingar sum byrja á Musikkskúlamiðnámi ella PO eru eisini at rokna sum næmingar í víðarikomnu deildini, tó eru serligar krøv og lesiætlanir til hesar útbúgvingar. Tíðin, víðarikomna deildin varir, má taka støði í tí einstaka næminginum, og har hevur ídni, aldur, búning og evni sera nógv at siga, men vanliga er hon 3-4- ár. Úrmælingar kunnu koma fyrr í víðarikomnu deildina, men eisini kann vera nattúrligt at nýta longri tíð áðrenn komið verður so langt. Tá ið víðarikomna deildin, menningarstig 5, er fingið til høldar eigur ein fagottnæmingur at vera førur fyri:

- at hava natúrliga og væl vanda munnstøðu
- at hava lættar og kimiligar fingrarørslur og kunna spæla skjótt allastaðni í registarinum
- at hava djúpa innanding og góðan stuðul og brúka luftina fjølbroytt
- at hava gott tamarhald á vibrato og kunna nýta vibrato á ymiskan hátt
- at kunna stemma ljóðførið saman við øðrum ljóðførum
- at spæla reint, at hava førleika at intonera og at kunna tillaga inntoneringina
- at hava góða styrki á tónunum, og duga at variera ljóðstyrki
- at kunna gera týðiligan mun á ymiskum artikulatiónum
- at hava góða tungutøkni og kunna nýta bæði einfalda og tvífalda tungu
- at vita um, og í ávísan mun duga at brúka tøkni sum verður brúkt í tónleiki frá 20.øld
- at nýta allar fingrasetningar – at spæla verk uttanat

- at frasera yvirbevísandi
- at vita um og brúka ymisk sløg av musikalskum stílum
- at duga at venja effektivt og sjálvsøðugt

### Uppgávan hjá lærarenum er

- leggja eina menningarætlan, ið er á høgum fakligum og tónlistaligum støði.
- eggja til sjálvstøðugan arbeiðshátt.
- vera førur fyri at síggja menningarmøguleikar, kveikja og geva íblástur.
- birta upp undir tónlistaligt tilvit.
- fáa næmingin at vera tilvitaðan um at seta sær stutt- og langtíðar mál.
- leggja til rættis fjølbroytt samspæl, og geva næminginum drúgvar royndir á palli.
- meta um bæði tilgongd og tilfar saman við næminginum.
- leggja dent á gott samstarv millum heim, musikkskúla, lærara og næming.

# FRAMKOMIN DEILD - MENNINGARSTIG 5

## VERKLISTI

*W.A. Mozart, concerto Bb-dur, KV191*
*C. Saint Saens, sonata in G-dur, op.168 (Henle)*
*Spohr, adagio in F-dur, op.115 (IMC)*
*C.M. von Weber, concerto in F-dur, op.75*
*E. Elgar, romance, op.62*
*Pierné, solo de concert, op.35 (LeDuc)*
*C.P.E. Bach, sonata in d-moll for bassoon solo (Emerson)*

## VENJINGAR

*Pivonka, rhythmical etudes (Bärenreiter)*
*L. Milde, concert studies, op.26, vol.1*
*L. Milde, 25 studies in scales and chords, op.24*
*Jancourt, 26 melodic studies*

## TÓNASTIGAR, TRÝ- OG FÝRALJÓMAR, MINKAÐAR OG VÍÐKAÐAR LJÓMAR, IMPROVISATIÓN O.A.

Allar moll og dur tónastigar og trýljómar (moll tónastigar bæði melodiskt og harmonikst)

Kromatiskt:
Bb-D, 3 oktavar

Fýraljómar:

Dominant7 í:
2 oktavar: Bb-dur, Db-dur, D-dur, Ab-dur, B-dur
3 oktavar: Eb-dur, E-dur, F#-dur, G-dur

Dim7 á:
2 oktavar: Eb, F, F#, Ab, A
3 oktavar: B, C, C#, D